Ítróttar
Sosialurin
Nr. 70 • fríggjadagur • 7. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tað verður ein harður dystur



*Janus Einar Sørensen úr Kyndli v.m. og Agnar Joensen úr VÍF h.m. vænta, at FM-finalan millum Kyndil og VÍF á Hálsi leygardagin verður ein harður dystur við nógvum útvísingum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Leygardagin verður næsti finaludysturin í manshondbólti millum Kyndil og VÍF leiktur í høllini á Hálsi. Bæði liðini vænta ein knallharðan dyst**

FM-BRAK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er hósdagur, og tveir dagar eru til stóra FM-brakið í manshondbólti í høllini á Hálsi í Havn millum teir báðar risarnar í føroyskum manshondbólti, Kyndil og VÍF. Vit hava sett teimum báðum sterku strikuspælarunum hjá liðunum báðum, Janus Einari Sørensen úr Kyndli og Agnar Joensen úr VÍF, stevnu í Miðlahúsinum at tosa um dystin, og hvussu teir vænta, at leikur fer.

### Fáa neyvan líka lætt spæl

Kyndlamaðurin Janus Einar Sørensen er sannførdur um, at dysturin leygardagin als ikki fer at líkjast fyrstu finaluni, sum var leikt í Vestmanna seinasta sunnudag, og sum Kyndil vann greitt 28-23.

– Tá fingu vit rímuliga lætt spæl, og eg eri sannførdur um, at vit fáa ikki líka lætt spæl leygardagin. Eg rokni eisini við, at teir fara at mansverja Høgna (Klein, blóm.) frá fyrsta bríksli, tí hann var ógvuliga avgerandi sunnudagin, sigur Janus Einar.

Strikuspælarin hjá Kyndli sigur, at nú hava teir grønu úr Havn sjálvir møguleikan at avgera tað heila, meðan vestmenningarnir hava ryggin móti múrinum.

– Tað er kanska ein fyrimunur hjá teimum, tí vit hava alt at tapa. Eg rokni eisini við, at teir fara at koma sum lyn og torden frá fyrstu løtu, sigur Janus Einar Sørensen.

### Ræður um at vilja

Strikuspælarin hjá vestmenningum, Agnar Joensen, heldur, at tað er eingin ivi, hvat fyrsta kravið hjá VÍF er, um Kyndil ikki skal fara avstað við gullinum leygardagin.

– Hjá okkum ræður tað fyrst og fremst um at hava viljan at vinna, tí uttan hann nyttar einki. Sunnudagin, tá ið vit spældu í Vestmanna, høvdu teir nógv meira vilja enn vit, og tað gjørdi munin. Um man ætlar sær meistaraheitið, skal man verða svangur, sigur Agnar Joensen.

### Bardagi og nógvar útvísingar

Bæði Janus Einar og Agnar vænta, at finaludysturin verður hart leiktur, og tað verða nógvar útvísingar.

– Tað stendur nógv upp á spæl, og tað verður ivaleyst spælt á markinum, halda teir báðir.

Teir fegnast í hesum sambandi um, at tað er altjóða føroyska dómaraparið, Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen, ið skulu leiða dystin, tí teir plaga at hava eina góða linju, har hart spæl verður loyvt í ein ávísan mun, meðan svínskt spæl verður revsað hart.

Janus Einar Sørensen og Agnar Joensen leggja tó dent á, at sjálvt um talan kann gerast um ein ógvuliga harðan dyst úti á vøllinum, so er alt hetta gloymt, tá ið dysturin er lokin.

– Uttan fyri vøllin hava vit tað øgiliga gott saman. Spælararnir kennast væl, og hóast talan er um tvey lið, ið eru arvafiggindar, so er samanhaldið sera gott millum spælararnar á hesum báðum liðum, siga Janus Einar og Agnar.

### Johnny verður ikki við

Í vikuni hava liðini bæði vant fram móti finaludystinum, men hvørki Janus Einar ella Agnar vilja avdúka ov nógv um, hvat teir hava vant.

- Vit hava vant ymiskt, men tað er neyvan nakað ókent. Tað skuldi eisini verið løgið, um teir nú skulu komið við onkrum kollveltandi, heldur Janus Einar Sørensen.

Agnar Joensen roknar heldur ikki við, at nakað av liðunum fer at koma við nøkrum heilt nýggjum, men hann sigur tó, at hjá teimum hevur stórur dentur verður lagdur á verjuna.

– Hjá okkum er tað einki sum eitur. Tað er verjan, ið skal vinna dystin fyri okkum, sigur Agnar.

Kyndil hevur alt fólkið hjá sær tøkt, og í Vestmanna eru næstan allir menn klárir. Eldri bróður Agnar, Johnny, var tó óheppið og meiðslaði sær eitt liðband í fótinum sunnudagin, og hann verður tí ikki við. Eisini er ivi, um ungi Regin Joensen verður førur fyri at spæla, tí hann hevur trupulleikar við knænum.

## Dyrgja eftir vertsskapi

Leygardagin fer Niels Peter Bech, HSF-umboð, á fund við EHF. Ein av spurningunum, sum verður umrøddur her, verður, hvørjar tjóðir eru millum kandidatarnar at hýsa komandi Challenge-Trophy kappingini. Her hevur HSF sýnt stóran áhuga at hýsa kappingini, sum tá væntandi fer at telja 12 lið. Og hvussu møguleikarnir eru fyri hesum, stendur helst nakað greiðari leygardagin.

## ÍF ætlar sær meira

ÍF-B36
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Liðini, sum hittast til dystin í Fløtugerði í Fuglafirði sunnudagin, eru í ymiskum støðum. ÍF tapti stórt í fyrsta dystinum í ár, meðan B36 vann ein sera góðan sigur á Skála.

ÍF spældi verjukent í Havn, men teir kláraðu ikki at halda tætt ímóti unga HB-liðnum, sum skoraði fimm ferðir. Nú verður ÍF á heimavølli, og tað er beinanvegin ein onnur útgangsstøða. Teir ætla sær at leggja meira fyri, og teir hava altíð ein álopsjokara í Bartali Eliasen, sum spældi í verjuni ímóti HB.

Allir teir somu spælararnir, sum vóru við ímóti HB, eru tøkir aftur hesaferð.

B36 fekk eina flúgvandi byrjan við einum sigri ímóti Skála síðsta vikuskiftið, og hóast B36 aftur hesaferð er á útivølli, ætla teir at tvífalda sítt stigatal.

Landsliðsspælarin Bergur Midjord hevur ikki verið við seinastu vikurnar, tí hann breyt fótin á venjingarlegu hjá landsliðnum, og hann verður heldur ikki við í Fuglafirði.

## B68 fær styrk

B68-GÍ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

B68-venjarin Jóannes Jakobsen hevur meira fólk at taka av til dystin ímóti GÍ sunnudagin, enn hann hevði í fyrsta umfari. B68 hevði tvey leikbann í seinasta dysti, men bæði Øssur Jacobsen og Jóan Petur Poulsen hava loyvi at spæla aftur sunnudagin. Øssur er tó ivasamur orsaka av einum skaða.

Harafturat verður eisini roknað við, at Magnus Jakobsen og Kristian Anton Andreasen, ið hava verið skaddir, kunnu spæla um vikuskiftið.

Bíðað verður framvegis eftir loyvum til hollendska spælaran Ralph van Dooren, men hetta loyvi nærkast í hvørjum.

GÍ stillaði úti við sterkastu manning í dystinum í fyrsta umfari, men bíðað verður framvegis eftir loyvunum hjá argentinska spælaranum Gunnar Nielsen. Møguliga verður Gunnar við um vikuskiftið. Pól Ennigarð lá sjúkur seinasta vikuskiftið, men hann er komin fyri seg aftur og spælir sunnudagin.